**Vágs Bóltfelag**
**Stovnað: 05.06.1905**
**FO-900 Vágur, Postrúm 134**
**Tlf. 373679/Fax 373679**
**Formaður:** John Henrik Holm

**Meistarar (1):** 2000
**Steypavinnarar (1):** 1974
**Greipuvinnarar:** Ongantíð
**Í 1. Deild (42 ár):** 1943, 1946-50, 1952, 1956-59, 1966-1981, 1987-1993, 1995-
**Í Europa (2):** Meistarakapping 2001/2002, Intertoto 1998/99

# Tað mesta er nýtt

**Í Vági skulu tey enn einaferð undir at byggja nýtt lið upp, og tó at sporini ræða, so tykjast vónirnar hava meira støðufesti hesaferð, enn tær áður hava havt**

JÁKUP MØRK



*VB stendur mitt í einum nýggjum ættarliðsskifti.*

Mynd: Álvur Haraldsen

– Milliónin skal nýtast til ungdómsarbeiðið.

Somikið avgjørdur var táverandi VB-formaðurin, Mannbjørn Tausen, tá hann eftir nývunna meistaraheitið í 2000 varð spurdur, hvussu felagið ætlaði at nýta peningaliga heiðurin, sum fylgdi við hesum.

## Ræðandi skifti

Og tað er einki at ivast í, at nakað hevur verið um tosið. Nógvu seinastu árini hevur VB verið eitt av teimum feløgum, sum hava lagt størstu orkuna í menningina av nýggjum leikarum.

Kanska vóru tað serliga avleiðingarnar av teimum báðum seinastu ættarliðsskiftunum, sum ræddu leiðsluna. Ta einu ferðina við einum niðurtúri heilt niður í triðju deild sum fylgju, og so tá „gull-liðið“ so spakuliga tók seg upp seint í 80'unum. Eitt lið, sum á sama hátt sum dunnuungin hjá H.C. Andersen noyddist ígjøgnum so nógv, áðrenn tað gjørdist gott.

## Hvønn vegin fer tað

Nú stendur VB eisini fyri einum nýggjum ættarliðsskifti. Hetta byrjaði longu í fjør, men í nógvar mátar var hetta við til at skapa órógv í felagnum. Í øllum førum vóru ikki allir í leikarahópinum samdir um, at skiftið skuldi verða so ógvusligt, og eftir innanhýsis stríð í fleiri mánaðir varð endin, at Dragan Kovacevic var settur frá sum venjari.

Hetta merkti tó ikki, at ættarliðsskiftið steðgaði av teirri orsøk. Við gullinum í dreingja- og unglingadeildini prógvaði felagið í fjør, at nýggir leikarar vóru ávegis, og í ár verða tað í stóran mun hesir, sum koma at seta dám á liðið.

Verður sæð burtur frá trimum royndum leikarum og so teimum fýra útlendingunum, er talan um eitt sera ungt lið, og spurningurin er so, hvussu hesir megna yvirgangin til vaksnamannafótbólt. Nógv veldst ivaleyst um, hvussu byrjanin verður. Verður mótburðurin ov stórur, ber kanska til at ímynda sær, at mótið fellur við fúkandi ferð, men hinvegin kann uppreistrarlyndið í ungdóminum eisini gera, at leikararnir bara treiskast enn meira.

Hinvegin kann viðrák í slíkum førum bera heilt langt. Fáa nýggju leikararnir kensluna av, at hetta væl ber til, er einki at ivast í, at dirvið og frekleikin verður enn størri, og so kann tað væl verða, at vágbingar vera heilt stóra yvirraskilsi hetta kappingarið.

Eitt er víst, og tað er, at fortíðin hevur lært hini feløgini í landinum, at VB so avgjørt ikki er eitt lið, sum bara leggur seg niður uttan viðari.

## *Leikarahópur*

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Bjarni Johansen | 18/-24 (0-0) | 2/-5 | |
| Finnbogi Olsen | | | |
| **Verja** | | | |
| Eyðun Jacobsen | 16/1 (1-0) | | |
| Michael í Lágabø | 14/0 (0-0) | | |
| Eyðstein í Lágabø | | | |
| Dejan Nikolic (JUG) | | | |
| Slobodan Madzar (JUG) | 14/0 (5-1) | | |
| Jón Gærdbo | 7/0 (1-0) | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Kári í Lagabø | | | |
| Milan Kulic (JUG) | | | |
| Hallur Joensen | | | |
| Palli Augustinussen | 18/4 (2-0) | 1/0 | |
| Gisli Sveinbjørnsson | 8/0 (1-0) | | Royn |
| Mortan úr Hørg | 16/2 (2-1) | | Sumba |
| Pól Poulsen | | | |
| Jákup Olsen | 1/0 (0-0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Birgir Jørgensen | | | FS Vágar, Sumba, TB |
| Dan Djurhuus | | | |
| Predrag Zivkovic (BOS) | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Milan Kulic (JUG) | | Jugoslavia | |
| Dejan Nikloic (JUG) | | Jugoslavia | |
| **Frágongd** | | | |
| Magni Jacobsen | 18/0 (1-0) | Givin | |
| Nenad Zivanovic (JUG) | 17/3 (5-0) | Uttanlands | |
| Jón Pauli Olsen | 14/1 (0-0) | Givin | |
| Robert Cieslewicz (PÓL) | 13/2 (0-0) | Sumba | |
| Tórður Holm | 11/0 (0-19 | | |
| Símun Samuelsen | 3/0 (0-0) | GÍ | |
| **Venjari** | | | |
| Predrag Zivkovic (BOS) | | | |



# Framtíðin skal tryggjast

**– Tað verður neyvan í ár, men innan stutta tíð er VB aftur partur av føroyska fótbóltsoddinum, og tá verður støðan meira varandi, heldur nýggi VB-venjarin**

JÁKUP MØRK

Tað var rættiliga tíðliga eftir lokna kapping, at VB hevði gjørt greitt, hvør skuldi verða venjari hjá felagnum hetta komandi árið. Predrag Zivkovic, sum kom til felagið í 2000, hevði undan hesum verið venjari hjá yngru liðum felagsins, og tá honum stóð í boði at gerast venjari hjá besta liðnum, var hann ikki seinur at taka av.

## Hevur bakgrundina

Nú er nýggi venjarin farin undir yrki sítt, og tá vit her í apríl mánaði hittu hann á orðið, tóktist hann bara lata heilt væl at gongdini higartil.

– Eg haldi hetta vera eina sera spennandi avbjóðing. VB stendur mitt í einum ættarliðsskifti, sum nú av álvara skal standa sína roynd. VB hevur havt eitt væl rikið ungdómsarbeiði seinnu árini. Vit hava nógvar góðar ungar leikarar, og eitt nú vunnu vit bæði dreingja- og unglingadeildina í fjør, og nú skulu hesir so taka stigið upp í vaksnu røðirnar.

Og tó at hann ikki hevur tær drúgvu royndirnar sum venjari, so tykist tað í nógvar mátar so, at Predrag er rætti maðurin at standa við stýrisvølin, nú hetta skifti skal fara fram. Fýra ár á ítróttarskúla í heimlandinum, umframt at hann seinni hevur víðkað hesa útbúgving við fótbólti sum sergrein, skuldu í øllum førum tryggjað, at ástøðiliga bakgrundin er í lagi. Og hartil koma so eisini royndirnar, sum hann hevur ogna sær gjøgnum eitt langt lív á fótbóltsvøllinum.

## VB verður í oddinum

Kunnleikin til føroyskan fótbólt er sjálvandi eisini hampuliga stórur eftir fýra ár í Vági, og tá tosið fellur inn á, hvussu lið hansara kann standa seg, er venjari bjartskygdur.

– Nú hava vit eitt stórt skifti í bæði leikarum og spælistíli í ár. Vit hava gjørt av, at vit nú skulu spæla við flatari verju, og tað skulu vit sjálvandi venja okkum við. Her er tað sjálvandi eitt sindur keðiligt, at venjingardystirnir hava verið so fáir, men vit hava so eisini steypakappingina, so vit skuldu verið komnir nakað áleiðis, áðrenn landskappingin byrjar.

– Akkurát, hvør styrkin hjá okkum er, er kanska eitt sindur ilt at siga, men eg beri ongan ótta fyri, at vit ikki kunnu standa okkum. Vit hava sum so ikki sett okkum mál um nakra plasering, men vit eru samdir um, at vit skulu røkka so langt, sum tað á nakran hátt er gjørligt. Hetta fyrsta árið er meira at rokna sum eitt royndarár, har liðið skal brynjast til komandi árini, men eg eri ikki í iva um, at øll liðini í deildini fáa tað trupult ímóti okkum.

– Og tá vit fyrst hava vant ungu leikararnar við bestu deildina, eri eg ikki í iva um, at vit kunnu røkka heilt langt. Sum sagt, so verður tað neyvan í ár, men innan stutta tíð kann VB aftur vera við í toppinum av føroyskum fótbólti, og við dygga ungdómsarbeiðinum eri er ivaleysur í, at tann støðan fer at standa við í nógv ár.

## Snýr seg um teir ungu

Heilt uttan royndir er VB-liðið tó ikki. Av teimum, sum í 2000 vóru við til at tryggja meistaraheitið, eru bert Bjarni Johansen og Eyðun Jacobsen eftir av teimum royndu, og so er Birgir Jørgensen nú eisini við frá fyrstu venjingunum. Hartil koma teir fýra útlendsku leikararnir, sum VB í ár hevur á liðnum. Slobodan Madzar og Dejan ??? í verjuni, Milan Kulic á miðvøllinum og so Predrag sjálvur í álopinum. Eitt pláss, sum hann annars ikki hevur røkt tey árini, hann hevur spælt í VB.

– Eg eri upprunaliga álopsleikari, men ta einu ferðina í Jugoslavia vóru fleiri skaðar í verjuni, so venjarin flutti meg aftur. Og har havi eg so verið síðani, so heilt galið mundi tað neyvan vera, heldur hann. Men nú eri eg so aftur í álopinum, og tað uppgávuna gleði eg meg sjálvandi eisini til.

Men tað er eyðsæð, at tað í ár eru teir ungu í VB, sum tað snýr seg um. Sum sagt, so metir venjarin sjálvur, at hetta eru leikarar, sum kunnu koma heilt langt, men hóast hetta, so vil hann ikki seta nøvn á vónirnar. Helst eisini tí hann ikki vil skapa óneyðugt trýst á leikararnar.

– Men tað er greitt, at tað eru nógvir ungir leikarar, sum koma fram í føroyskum fótbólti í løtuni. Her hava vit seinnu árini sæð Palla Augustinussen og Mortan í Hørg bitið seg rættiliga fastar, og á landsliðnum tykjast fleiri ungir leikarar at gera um seg.

– Skal eg nevna ein einstakan leikara, sum eg rokni mær heilt nógv av, so er tað Símun Samuelsen, men hann er tíverri ikki í VB longur. Hann verður við GÍ í ár, og eg ivist ikki í, at nógv verða bilsin av hansara fótbóltsevnum. Sjálvandi havi eg vónir um, at nakrir av okkara egnu veruliga fáa sítt gjøgnumbrot í ár, men tað kanst tú ikki siga við vissu. Eitt er tó víst. Menningin hjá hesum er stór, og um fá ár eru teir berandi kreftir á liðnum, so eg beri als ongan ótta fyri, at VB ikki skal standa seg í kappingini við hini feløgini, sigur Predrag Zivkovic.



*– VB stendur mitt í einum ættarliðsskifti, sum nú av álvara skal standa sína roynd. VB hevur havt eitt væl rikið ungdómsarbeiði seinnu árini. Vit hava nógvar góðar ungar leikarar, og eitt nú vunnu vit bæði dreingja- og unglingadeildina í fjør, og nú skulu hesir so taka stigið upp í vaksnu røðirnar, sigur Predrag Zivkovic, spælandi venjari hjá VB.*

Mynd: Álvur Haraldsen